Tjóðskjalasavnið

# Skjalasøvn, høli og goymsluviðurskifti:

Høli til skjalasøvn eru fevnd av ásetingunum í lógini um Føroya Landsskjalasavn - Løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um Føroya Landsskjalasavn, sum broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 30. apríl 2018 - um at tað áliggur almennum stovnum at hava neyðturviligt fyrilit fyri savnindum sínum.

## Ætlan fyri savnshøli

Tá myndugleiki skal gera av, hvar savnshøli skulu vera og hvussu hesi skulu verða innrættað, skal verða havt í huga:

- Styrkin í gólvinum (hvussu nógv gólvið ber) og hvat gólváleggingartilfar verður nýtt
- Veggflatan
- Vindeygastødd og atkomumøguleikar
- Hvar reolirnar verða settar
- Elinnleggingar
- Hvar rør eru
- Luftvætu og hita
- Stuldurstrygging
- Brunatrygging

Av størsta týdningi er tó at myndugleikin frá byrjan tekur fyrilit fyri sundurbrótingarfaktorum og fysisku treytunum fyri varðveiting
.

# Pappírssavnindi, varðveiting:

Mælt verður til at savnindi verða varðveitt:

- Við hita, ið liggur oman fyri 10 °C og undir 30 °C. Frábrigdi innan fyri 24 tímar má hægst verða +/- 5 °C. Besti hitin er mettir at vera millum 15 - 20 °C
- Við luftvætu, ið liggur millum 40 % og 55 % RF (relativ fukt) +/- 5 %
- Í einum rúmi við luftrensli har luftin støðugt verður endurnýggjað

## Plasering og innrættan

Royndirnar vísa, at savnshøli oftast verða løgd í kjallara ella á loftshædd. Hvørgin av hesum loysnum er tó tann besta. Hædd skal tí verða tikin fyri:

- Váði fyri bruna- ella vatnskaða má ikki standast av hølum, ið liggja upp at savnshøli. Savnshøli eiga tí ikki at verða løgd í nánd av fýrrúmum, bilhúsum, transformaturrúmum, vátrúmum, køkum o.l.
- Savnshøli eiga at verða tryggjað móti innbroti og herverki. Tó skulu tey ikki verða løgd soleiðis, at tað er trupult at bjarga savnindum, um eldur er í ella vandi er fyri vatnskaða
- Savnshøli, ið liggja í kjallara, skulu hava frárensl í gólvi og niðasta reólhillin eigur at vera minst 10 sentimetrar yvir gólvinum
- Betonggólv eiga at verða løgd við linoleum ella málað. Kunstevni eiga ikki at verða løgd á gólv orsakað av vandanum fyri statiskum elektrisiteti. Veggir eiga at vera málaðir fyri at minka um støv. Ikki eigur at verða flutt inn í hølið fyrr enn málingin er heilt turr, t.v.s. aftaná 4 – 6 vikur

- Áðrenn høli verða innrættað á loftshædd er sjálvsagt at trygd fæst fyri at tekja er tøtt. Góðkenning frá brunamyndugleikum skal altíð fyriliggja

Gott hugskot er at hava ein fuktmátara í hølinum so til ber at máta hita og lufvætu við jøvnum millumbilum.

| Tilfar | Luftvæta (RF%) | Hiti (°C) |
|---|---|---|
| **Pappír** | 40 % - 55 | 15 – 20 °C |
| **CD-ROM** | 40 % | 15 – 20 °C |
| **Filmur** | 40 % | max. 15 °C |
| **Ljóð- og myndbond** | 40 % | max. 15 °C |

- Tað eiga ikki at vera vatnrør í savnshøli. Vatn kann hava við sær óbótaligan skaða á savnindi.
- Sikringsboksir, málari og onnur tílík el-útgerð eigur ikki at vera inni í savnshøli
- Um radiatorar verða nýttir at hita høli við eiga hesir at vera termostatstýrdir og yvirflatihitin ikki at verða hægri enn 60 °C

Savnshøli eru arbeiðspláss á jøvnum føti við skrivstovuhølir. Savnshølið skal tí vera turt og ikki ov heitt. Luftendurnýggjan skal vera og tað skal vera so rúmsátt millum reolir, at til ber at flyta seg uttan ampa. Ljósið eigur at vera soleiðis, at til ber at síggja hvat er sett á einstøku hillarnar.

## Serstakt um kort, tekningar, myndir og ljóð- og myndbond.

Goymsla av kortum, tekningum og myndum seta serstøk krøv til savnshøli, m.a. tí at tey hava:

- serstakar støddir
- avmarkað ella vánaligt haldbæri
- eru viðbrekin
- eldast av teknologiskum orsøkum

Kort, tekningar, bond, filmar v.m. kunnu verða partar av einum máli ella vera ein serstøk savnseind. Hvønn goymsluhátt einstaki myndugleikin velur valdast stødd, nøgd og hvussu ofta tilfarið verður nýtt.

Um tilfar, sum omanfyri nevnda, ofta er partur av málsgongdini hjá myndugleika, verður mælt til, at tilfarið verður skipað sum serstøk savnseind og at tað í einstaka málinum so verður víst til hesa savnseindina.

**Stødd**
Savnshølið eigur bert at verða nýtt til goymslu av savnindum. T.v.s. at tað skal eitt nú ikki nýtast til óruslurúm, har goymd verður gomul skrivstovuútgerð, ambætararúm e.l.

Støddin er tí bert tengd at savnindunum og savnindavøkstrinum innan fyri eina fasta árrøð. Sambært skjalasavnslógina skulu myndugleikar hava egin savnindi í 30 ár og skal hølið sostatt rúma 30 ára savnindaframleiðslu.

Hædd skal sjálvandi verða tikin fyri vraking og støðugari reinsan.

Mett verður at 6-7 hillametrar av savnindum eru pr. fermetur gólvvídd um nýttar verða ”stationerar” reólir og 11-12 hillametrar savnindi pr. fermetur gólvvídd í compactusreolum – sjálvsagt alt eftir hvussu høgt er millum loft og gólv.

- Ein hillametur av savnindum pakkaður í A4-savneskjur vigar umleið 60 kilo, í foliostødd tó umleið 80 kilo.